# H71

faldari 4

FTZ KAPPINGIN

## H71 - KÍF

Sunnudagin 13. des. kl. 16.00

Hoyvíkshøllin




SUÐUROYAR SPARIKASSI

J&K

BÓNUS -er biligari!

P/F THOMAS DAM
ÍTRÓTTARDEILDIN · N. Finsensgøta 5 · Tel. 31 14 03

polytan

Advokatfelagið
Yviri við Strond 4

Auto Service

INNI

# FOKUS 18:29

## Lætt og stuttligt



Gjaldskort
Fígging
FramtíðarKonta

ss.fo

SUÐUROYAR SPARIKASSI

AnniJanni

SMYRIL LINE
EXPLORERS OF THE NORTH ATLANTIC

# Frítíðin byrjar umborð




Lætt og ómakaleyst ber til at koyra bæði Danmark, Ísland og alt Evropa upp og niður, júst tá passar tær. Við egnum bili er alt nógv lættari. Pakka viðførið í bilin, koyr umborð og njót ferðina.

Tá tú ferðast við Norrönu, kanst tú byrja at halda frí, leingi áðrenn tú kemur fram til títt frítíðarstað ella summarhús. Umborð á Norrönu kanst tú halda frí, so tað stendur eftirí.

Les meira á **www.smyrilline.fo**, skriva til **booking@smyrilline.fo** ella ring **345900**

# EIN DUPULTAN – TAKK



**SKILST, AT HENDA MÁLISKA HOYRIST Á DRYKKJUSTØÐUM FRÁ TYSTUM SÁLUM, IÐ HAVA TØRV Á EIN EYKA STYRK UNDIR HJARTAÐ. TÓ ER „EIN DUPULTUR“ EISINI EITT HUGTAK Í HONDBÓLTSHEIMINUM OG MEINAST TÁ VIÐ LEIKUMFØR INNANHÝSIS MILLUM TEY HONDBÓLTSFELØG, IÐ HAVA LIÐ Í FREMSTU DEILDINI BÆÐI HJÁ KVINNUM OG MONNUM. TÁ HESI FELØG MØTAST INNANHÝSIS, ERU TVEIR DYSTIR SAMA DAG ÍMILLUM HESI FELØG, OG ER SLÍKT „EIN DUPULTUR“.**

Sum kunnugt hevur H71 ongantíð haft lið í fremstu deildini hjá kvinnum, so av góðum grundum hava hoyvíkingar higartil bert kunna biðið um ein dupultan á drykkjustøðum. Men nú eru tekin í sól og mána um, at broyting er um at koma í hjá hoyvíkingum í so máta. Ikki tað at givið verður at biðja um ein dupultan á drykkjustøðum, har tikist støðan at vera óbroytt, men heldur er tað tað, at soleiðis sum fremsta kvinnulið okkara leikar í løtuni, so eru avgjørd útlit fyri at vit fáa lið í Hvonn-deildini komandi ár.

Eftir at H71 hevur leikt 7 umfør í næstfremstu kvinnudeildini, eru vit á odda saman við Kyndli og StíF, øll jøvn við 10 stigum hvør. Kyndil hevur leikt 6 dystir, H71 7 dystir og StÍF 9 dystir. Nummar 4 er Neistin við 7 stigum eftir 6 dystir. Sum kunnugt hava bæði Kyndil, Neistin og StÍF frammanundan lið í Hvonn-deildini, so um H71 bert klára at halda eitt 3 pláss, so rykkja tær upp í Hvonn-deildina.

Nú er sjálvsagt ilt at meta um gongina restina av árinum. Men fremst kvinnulið hevur tikið seg fram í stórum tað farið er av leikárinum higartil. Bara dystir vit hava leikt ímóti Neistanum geva greitt boð um hetta. Hin 12. oktober leikti H71 heima ímóti Neistanum

*framhald á síðu 13*




# Avatara

## Ein heilt nýggj og serstak verð innan gólv

### AVATARA

Avatara er eitt gólv við fyrimunum frá bæði tí slitsterka laminatgólvinum og tí ektaða parkettgólvinum. Nýggja avataragólvið líkist fullkomiliga einum trægólvi, hevur træstruktur og er mjúkt og heitt, júst sum træ. Samstundis er avataragólvið líka slitsterkt sum eitt laminatgólv og krevur einki viðlíkahald. Prísurin er heldur ikki at fara skeivur av: Avataragólvið er munandi bíligari enn eitt parkettgólv.

Prísir úr 158,- fyri m²

30 ára garanti

NÓGV YMISK & SERA VØKUR MYNSTUR

- **Júst sum træ at síggja til**
- **Strukturin kennist sum træ**
- **Heitt og mjúkt at ganga á**
- **Luktfrítt og heilsugóðkent**
- **Slitsterkt sum laminatgólv**



TIMBUR HT TILFAR HANDILIN


Lundin Financials
Lundin Løn
Trygg
fíggjarstýring
NEMA
SENDISTOVAN


Tað besta omaná
Forkelá familjuna. Royn okkara
leskiliga vaniljukrem.
VANILJU
KREM
Nýggj vøra!
MBM
SENDISTOVAN

NordikSOLO 18+

# Kom best frá byrjan við NordikSolo

Ert tú millum 18 og 28 ár, kanst tú gerast NordikSolo kundi og fáa eina rúgvu av ókeypis tænastum og serliga góðum rentum.




Vitja www.banknordik.fo/solo og gerst NordikSolo kundi.

BANKNORDIK

SENDISTOVAN

Pf. Jógvan Weihe

P/F Jógvan Weihe | Tel: 35 38 97 | Fax: 35 38 98

www.weihe.fo | weihe@weihe.fo

P/F Hjá Fróða

Jónas Broncksgøta 25
Tel 35 09 00
Fax 35 09 01
frodi@hjafroda.fo

Flügger




LM ELECTRIC - 100 TÓRSHAVN - HOYVÍKSVEGUR 53
TEL 35 12 20 - WWW.LM.FO - LM@LM.FO

fk

Keyp ein Toyota - og fá ein 3 ára servicepakka

Ongar útreiðslur til viðlíkahald í 3 ár



REYNI SERVICE
tel. 35 30 40 - www.reyniservice.fo


Dekk
- Vit selja øll sløg og allar støddir
- Vetrardekk á sportsfelgum
- Vit hava helst besta prísin
- Góð tænasta og góðir prísir
- Bil or not to bil
- sjálvandi frá Bilrøkt!
Ring 35 88 88 og bílegg tíð
Opið gerandisdagar frá 08.00 - 17.00
og leygardagar frá 10.00 - 13.00
bilrokt.fo
Stiðjagøta 3 · FO-100 Tórshavn · Tel: 358880 · Mobil: 235880 · bilrokt@bilrokt.fo · www.bilrokt.fo


WAAG
& COMPANY
WAAG & Co. P/f
Hoyvíksvegur 63
110 Tórshavn
Tel: 31 36 66
waag@waagbilar.fo
www.waagbilar.fo
OPIÐ ER: MÁNADAG - FRÍGGJADAG: 8.00 - 17.00
WAAG
& COMPANY

vistir.fo
haraldsen






Tú fært avsláttur av inngjaldinum til tínar privatu tryggingar hjá Tryggingarfelagnum Føroyum, um tú hevur tvær ella fleiri privatar tryggingar hjá okkum. Fleiri tryggingar tú hevur, størri avsláttur fært tú.

Hevur tú inngjald til Betri pensjón á minst 10.800 krónur árliga, fært tú 20% í avsláttri av tínum privatu tryggingum hjá Tryggingarfelagnum Føroyum, líkamikið um tú hevur 1, 2, 3, 4 ella fleiri privatar tryggingar.

**Tilsamans kanst tú fáa heilt upp til 32% í avsláttri**

*Set teg í samband við okkum á telefon 345600 ella tf@trygging.fo og fá eitt tilboð uppá tryggingar og pensjón.*

Betri pensjón

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

ÁTAKSTILBOÐ:
LUKSUS FAMILJUBILUR ÚR 390.000 KR



NÝGGJUR VOLVO V70 TRIBUTE
EITT SINDUR MEIRI AV TÍ GÓÐA TIL TÍN

Volvo V70 er ein sannur svenskur stationbilur. Stórur, høgligur, tryggur og sannførandi gjøgnumførdur úr enda í annan. Tann nýggi Tribute frá 2016 er veruligt skandinaviskt marglæti í teirru góðu og kendu Volvogóðskuni og við einum longum lista av útgerð. Fíggjarliga kanst tú gera kubbið júst nú bæði í mun til sjálvan bilin og í mun til útgerðspakkan. Bóka ein royndartúr hjá Wenzel

ÚR 390.000 KR

P/F Wenzel | Akranesgøta 5 | FO-100 Tórshavn | tel 35 45 00 | fordpost@wenzel.fo | www.wenzel.fo

WENZEL

NORÐOYA SPARIKASSI

Orkulán 2,5%

- Bústaðarlán við lágari rentu

***Bílegg eitt kundaprát***
*og fá meira at vita um fyrimunirnar við orkuláninum*



*Norðoya Sparikassi - Hoyvíksvegur 67 - FO-100 Tórshavn Tel. 47 5000 - ns@ns.fo - www.ns.fo*

*framhald av síðu 4*

> ***Og er tað nakað vit í Hoyvík kunnu fyrihalda okkum til, so er tað alt tað fyrireikingararbeiði lagt er í at menna FTZ liðið til tað støðið hetta lið hevur í dag***

og tapti heili 13 – 31. Dystur var aftur ímillum feløgini hin 22. novembur í høllini á Hálsi og tá vann H71 16 – 24. Gaman í Neistin stillaði í Hoyvíkshøllini við munandi styrktum liði, men tað reingir ikki tann veruleika, at liðið hjá H71 hevur tikið seg munandi fram.

At hava lið í fremstu deildini hjá kvinnum krevur munandi fleiri fyrireikingar í fremstu kvinnudeildini. Ikki tí at fyrireikingarnar higartil hava haft so lítið uppá seg, men heldur er tað tað, at eitt lið í Hvonn-deildini krevur so ógvuliga nógv meiri av felagnum. Ja tikist sum at fyrireikingarnar til Hvonn deildina eru eins krevjandi og fyrireikingarnar til FTZ-deildina. Og er tað nakað vit í Hoyvík kunnu fyrihalda okkum til, so er tað alt tað fyrireikingararbeiði lagt er í at menna FTZ liðið til tað støðið hetta lið hevur í dag.

Men sum skilst eru fyrireikingar so smátt farnar í gongd at styrkja um fremsta kvinnuliði og er felagið úti um seg at leita upp skikkaðar kandidatar til hópin, sum avgjørt verður neyðugt, fáa vit lið í fremstu kvinnudeildini.

Gerst Hvonn-lið veruleiki fyri H71 , ja so hevur H71 „dupultar" dystir tey vikuskifti leikt verður ímóti Kyndli, Neistanum, VÍF og StÍF. Ein nýggj og fyri felagið sera spennandi avbjóðing at fyrihalda seg til og sum eg onga løtu ivist í, at felagið verður ført fyri at greiða.

**Ítróttarfelagið Hoyvík H71**
Hoyvíkshøllin, Postsmoga 1067
188 Hoyvík · www.h71.fo

**NEVND**
Sunneva Jakobsen, forkvinna
231115, sunneva@liv.fo

Gunn Ellefsen, næstforkvinna
593040, ge@lawfirm.fo

Agga Niclasen, 508689
h71faldarin@gmail.com

Anna Dam, 519082
ad@lawfirm.fo

Rene Dahl Olesen, 235930
renedahlolesen@gmail.com

Emy Sólvitsdóttir, 513769
emys@olivant.fo

Bergtóra Høgnadóttir, 286011
bergtorajoensen@gmail.com

Janet Fríða Johannesen, 212211
jjoh@olivant.fo

Randi Frederiksberg, 212000,
randi.frederiksberg@gmail.com

**ÁBYRGD AV FALDARA**
Agga Niclasen, 508689
h71faldarin@gmail.com

**ÁBYRGD AV HEIMASÍÐU**
Agga Niclasen, 508689
h71faldarin@gmail.com

**SNIÐ, UMBRÓTING, PRENT OG LIÐUGTGERÐ**
Pf. Føroyaprent, www.foroyaprent.fo
– svanamerktur prentlutur 541 705
*Forsíðumynd: Jens Kr. Vang*

**ÚTGEVARI**
H71

# HIN ELEKTRISKI STÓLURIN




**Aldur:**
28.

**Hvørjum plássi spælur tú á?**
Málverji.

**Hvør FTZ-leikari heldur tú er løgnastur?**
Halgir er rættuliga løgin! Men uppá tann góða mátan!

**Dovnastur?**
Djóni Gaard.

**Størsta „drama queen"-in?**
Helgi Hoydal.

**Brúkar longst tíð frammanfyri speglinum?**
Pætur nippar eygnabrýr og rakar bein, so tað má verða hann!

**Hevur goldið mest til bótakassan?**
Tað má verða Djóni Gaard sum hevur flest bøtur, men trúgvi ikki hann hevur goldið eitt oyra enn.

**Hvat er tín størsta/besta hondbóltsupliving?**
Tað var stórt at sleppa at venja saman við Peter Krogh tá eg gekk á Viborg Håndbold College ;) Tað var eisini stórt at vinna greipuna í bestu mannsdeildini.

**Hvørjum sangum lurtar tu eftir, tá ið tú ert í brúsu?**
Sera ymiskt, men helst okkurt man kann syngja við til, eitt nú Lukas Graham.

**Nær fekst tú tín fyrsta muss?**
Minnist eg ikki, men giti eg havi verið umleið 14 ár.

**Vaskar tú tíni egnu venjingarlæðir?**
Nei, tey ornar mín fitta unnusta.

**Hvønn persón samanberur tú teg onkuntíð við - í allari hemmeligheit?**
á vøllinum: Tóraldur! uttanfyri vøllin: Tróndur Arge (okkara).

**Skoraði tú fleiri mál í tínum seinasta dystið, enn tú hevur skorað damur í tínum lívið?**
Nei, men eg haldi eg bjargaði fleiri skotum enn eg havi skorað damur!

**Hvat er títt yndlings #hashtag?**
Aldrin brúkt eitt slíkt, nokk ov gamal.

**Hvat ger H71 til besta hondbóltsfelag í Føroyum?**
Tað kundi eg skrivað skaldsøgu um, men í stuttum er tað at alt fungerar bara sum tað skal, her er einki roks, øll lyfta uppgávurnar í felag, t.e. nevnd, leikarar, foreldur, hjálparfólk o.s.v. Alt funkar bara!! og so sjálvandi at vit eru við í oddinum í næstan øllum deildum ger tað ikki verri!

**Hevur tú nakra flóvisliga hondbóltsøgu at fortelja?**
Ikki nakra ávísa, men eg blívi nokkso flóvur hvørja fer Jens stendur og skrálar eftir mær á síðulinjuni ... hansara vegna ;)

**H71**
ynskir øllum
eini gleðilig jól



# Studlajól

## í Hoyvíkshøllini
## 15. des. kl.17.00

Jólahaldið verður í Hoyvíkshøllini týsdagin tann 15. desember 2015 frá kl. 17 til umleið kl. 20.00.
Frá kl. 17 og umleið ein tíma fram verður ein hugnaløta, har vit fara at dansa um jólatræið. Vit fáa jólamenn á vitjan við pakkum til børnini og borðreitt verður við kaffi, te, smurdum breyði og køkum. Hvør familja verður biðin um at hava eitt fat av smurdum breyði við.
Aftaná hugnaløtuna verða hondbóltsdystir, har nøkur av yngru liðunum fara at spæla hondbólt ímóti foreldrum.
Systkin, foreldur, ommur, abbar og onnur eru sjálvandi vælkomin við.
Vit vóna at síggja nógv fólk í høllini.
Vaksin og børn skulu vera í ítróttarskóm og klár til ein dyst um neyðugt.
Við ynski um eini gleðilig jól og eitt gott nýttár.

Heilsan
H 71 Stuðlar

**H71**

Loysnir tel 214452









J & K

# ÆTLAR TÚ AT STOYPA?

Tosa fyrst við okkum.

Framkomna, teldustýrda betong-blandiskipanin syrgir fyri, at tú kanst vera heilt vísur í, at tú fært betong av allarbestu góðsku bæði til nýtslu á landi og undir vatni
Blandi- og pumpubilar okkara bera so í bandi, at útkoyring og fylling í formar v.m. ikki er nakar trupulleiki - heldur ikki um tvørligt er at sleppa framat.

Vit koyra um alt landið og eru kappingarførir í prísi!



J & K

## J & K Betong

á Hjalla | Postboks 3179 | FO-110 Tórshavn | tel 31 50 60 | fax 31 41 94 | e-mail: jkp@jkp.fo | www.jkp.fo
Blandimeistarin tel 58 50 25




Grannskoðan // Ráðgeving // Bókhald // Roknskapur

Skalt tú meta
um framtíðina
mást tú
kenna fortíðina

WWW.JANUAR.FO

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

SENDISTOVAN



# Takk fyri at tú stuðlar Javna

## Gerst limur í Javna

Far inn á okkara heimasíðu www.javni.fo, trýst á leinkjuna „Tekna teg sum lim“ og fylg vegleiðingini.

Hevur tú brúk fyri hjálp í sambandi við tilmeldingina, ring so til Javna á telefon 208090 ella 514827.

## Gerst stuðul hjá Javna

Ynskir tú at stuðla okkum við einari fastari upphædd hvønn mánað, far inn á heimasíðuna www.javni.fo og trýst á leinkjuna „Stuðulsgjald“ og fylg vegleiðingini.

Hevur tú brúk fyri hjálp í sambandi við tilmeldingina, ring so til Javna á telefon 208090 ella 514827.

javni

Hoydalsvegur 40/Loftið
FO-100 Tórshavn
Tel +298 20 80 90
javni@javni.fo
www.javni.fo






polytan®

simonsen@polytan.dk
tlf: 0045 39405420
fax: 0045 26745420
polytan ligaturf 240/el-25
FIFA 2 stjørnu góðkent

# Er skeltingin í lagi?

Vilt tú síggja gott út, hava kundar í handilin ella bíleggingar til fyritøkuna, kann skeltingin gerast munurin millum at eydnast og ikki eydnast. Tað skal ikki altíð so nógv til, og tað nýtist ikki at kosta nógv.

**Hugsa stórt – hugsa Føroyaprent**



Á Føroyaprent hava vit eitt framkomið skeltiverkstað, har vit kunnu framleiða nærum alt, tú kanst hugsa tær.

- Lýsandi stavir á stórar bygningar
- Smá skelti sum t.d. navnaskelti til skrivstovuna
- Stórar plakatir og bannarar til tiltøkini í summar
- Foliuprent til veggir, vindeygu og bilin

Nethandil

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI 541 705

Føroyaprent
Tel. 31 45 55 www.foroyaprent.fo








RÁKIÐ



VIT GERA ALT
BLIKK- OG
RØRARBEIÐI

Alt til HITA
SANITET &
VENTILATIÓN

Maria Poulsen & Co

Smyrilsvegur 8 Postboks 182 FR-100 Tórshavn Tlf. 312000

www.torshavn.fo



Skapandi, mennandi, kveikjandi

TÓRSHAVNAR
KOMMUNA




Ung í Eik
www.eik.fo/ung
Tel. 348000

Eik

# FÝRVERK Í HOYVÍKSHØLLINI

## UPPLATINGARTÍÐIR:

29-12-2015: 11.00-18.00
30-12-2015: 11.00-18.00
31-12-2015: 10.00-16.00

H71

Loysnir tel 214452

# KANN LEITANIN EFTIR OKKARA NÆSTU ÍTRÓTTASTJØRNU

# KOSTA OKKUM HANA?

*Mynd: hvirlan.fo*



*Orð: Heri Ziska*

Tað orðið, ið oftast verður haft á lofti innan ítróttina, er uttan iva „talent." Vit ynskja at „finna" næsta talentið, fyri á tann hátt at kunna fáa ein heimsmeistara. Tá vit so síggja eitt gott úrslit hjá einum barni ella einum unglingi, so eru vit skjót at siga „handan er eitt stórt talent!" Spurningurin er, um orðið verður nýtt í rætta samanhangi, og hvørt tað er við til at skapa trupulleikar bæði fyri „talentið" og fyri ítróttina sum heild.

Oftast verður sagt um íðkara, ið fær góð úrslit, at viðkomandi er eitt stórt talent. Enn størri er „talentið," um úrslitini eru sambærilig við, hvat onkur heimsstjørna megnaði í sama aldri. Tað, sum tá plagar at fylgja, er ein væntan um, at hesin íðkarin hevur eina bjarta framtíð innan ítróttina, t.e. eina framhaldandi framgongd, sum er líka stór ella størri enn hjá teimum, sum hava rokkið tindarnar.

Hyggur ein at teimum, ið fáa spjaldrið „talent," so kunnu hesi býtast í tríggjar høvuðsbólkar:

1. *Børn, sum hava gjøgnumført eina stóra venjingarmongd (ofta bara í eini grein) gjøgnum fleiri ár.*
2. *Dreingir, sum eru komnir tíðliga í pubertetin, og tí eru sterkari enn javnaldrarnir.*
3. *Børn, sum tykjast megna ting, hóast tey ikki hava vant greinina áður.*

Venjing gevur úrslit, og serliga er fyrsta spesialiserandi venjingin sera effektiv at hækka munandi um støðið hjá íðkaranum. Um man hevur vant meir miðvíst enn sínir javnaldrar, so er man komin longri í síni ítróttaligu menning, og tí er tað mest sannlíkt, at man vinnur í dysti móti javnaldrunum. Trupulleikin er, at tað boost, sum kemur frá at fara til spesialiserandi venjing, kemur bara eina ferð, og um „talentið" hongur í hesum boostinum, so sær framtíðin ikki eins lovandi út sum hjá javnaldrunum, sum ikki hava fingið hetta boost.

Tað er ongin loyna, at dreingir, sum koma í pubertetin, byrja at fáa vøddar. Styrkin økist munandi hesi árini, og tað ger, at teir kunna nógv, teir ikki kundu áðrenn, eins

og teir megna ting, sum javnaldrar, sum ikki eru komnir í pubertetin, ikki megna. Um „talentið“ hongur í tí, at drongurin er komin fyrst í pubertetin, so er lítið at koma eftir, tí allir dreingir koma fyrr ella seinni í pubertetin. Tá eysturtýskarar vóru í vælmaktini, nýttu teir eina úrvalsskipan, har dreingir, ið komu tíðliga í pubertetin, blivu vrakaðir til frama fyri teir, sum vóru seinir. Hetta tí, at menningarvindeygað, ið liggur beint undan pubertetinum, var longri og gav tí betri møguleika fyri at byggja eina sterka motoriska skipan.

Tað eru tó nøkur, sum gera seg galdandi, uttan at ein sær, at tey hava vant miðvíst og heldur ikki hava fingið ein ágóða av vøddatilvøkstri í sambandi við pubertetin. Hesi hava nakað, sum er eitt sindur truplari at eyðmerkja, men hvat tað so enn er, so er ongin ivi um, at vøddatilvøkstur og miðvís venjing vilja gera, at tey koma enn longri fram. Ella við øðrum orðum: Menningarmøguleikarnir eru stórir.

Hvussu kunnu hesi, uttan eina stóra venjingarmongd, klára seg í dysti móti øðrum? Hesin spurningur hevur leingi verið kjarnan í kjakinum um, hvørt talent er viðføtt ella eitt úrslit av menning av tí einstaka. Grundgevingarnar fyri, at tað er viðføtt, byggja ofta á eygleiðingar, ið vísa, at íðkarar frá ávísum økjum, ella við ávísari genetiskari bakgrund, klára seg best í summum greinum. Dømi eru, at rennarar úr ávísum pørtum av Afrika standa seg best í langteina renning, meðan finnlendingar standa seg væl í spjótkasti. Aftursvarið er, at tað er venjingarumhvørvið, sum er avgerandi í mun til hvør stendur seg væl, og um tú venur í Finnlandi, so hevur tú eitt umhvørvi, ið dugir væl at menna íðkarar til at kasta spjót.



Tað eru óivað sannleikar í báðum, men hvussu eigur hetta at ávirka venjingina í felagnum? Ella rættari, eigur hetta yvirhøvur at ávirka venjingina i felagnum?

Ávís venjingarumhvørvi megna at framleiða nógv fleiri „talentir" enn støddin annars hevði indikerað var møguligt. Millum dømini um slík umhvørvi er Spartak-tennisskúlin í Moskva, sum eitt skifti átti bróðurpartin av bestu kvinnuligu tennisleikarunum í heiminum. Eitt annað dømi eru renesansumálararnir í Firenze.

Tað, ið er felagsnevnari fyri nógv av hesum umhvørvinum, er, at fokus er á tað langsiktaða. Á Spartak-tennisskúlanum sleppa tey ikki at spæla við bóltum, fyrr enn tey duga at svinga ketsjaran rætt, og fyrstu trý árini sleppa tey ikki at kappast. Harumframt venja heimsstjørnur saman við nýbyrjarum. Í Firenze vóru nøkur „guilds," har ungir málarar vóru í læru hjá teimum meir framkomnu málarunum í eini skipan, har lærlingurin lærdi øll tey grundleggjandi elementini innan sína listagrein (og ofta innan aðrar eisini), áðrenn teir nógv ár seinni komu fram við teimum listaverkunum, sum gera, at teir eru kendir enn tann dag í dag. Ein líknandi lærlingaskipan er kend í danska siglisambandinum, har serliga teir, ið sigla sokallaðu 49'arnar framhaldandi megna at verða í heims- elituni hóast støddin á landinum og venjingarumstøðurnar annars ikki eru á sama støði sum hjá kappingarneytunum.

Bæði Spartak-tennisskúlin og guildini í Firenze hava megnað at hópframleiða „talentir." Í báðum førum hevur man eitt umhvørvi, har úrslit koma sum ein avleiðing av langsiktaðari venjing, heldur enn, at ein gekk og leitaði eftir, hvør var eitt talent.

Tað er ongin ivi um, at tann kroppurin, ein er føddur við, hevur ávirkan á møguleikarnar innan ítrótt. Ein høgur maður hevur truplari við at gera seg galdandi innan t.d. fimleik, og ein lágvaksin maður hevur trupulleikar við at gera seg galdandi innan t.d. hæddarlop. Tað er tó ikki ógjørligt, og um viljin og hugurin er har, so eru nógvar søgur um, at fólk hava megnað at vunnið heiðursmerkir á OL, hóast tey ikki eru født við einum kroppi, sum hóskar til ta ítrótt, tey blivu forelskað í sum børn.

Tað er tó eisini eyðsýnt, at kropsliga menningin hjá tí einstaka og ávísar tilgongdir til venjing hava sera stóra ávirkan á, hvør megnar at koma sær fram í ítrótti og harvið, hvør endar við at fáa spjaldrið „talent." Heldur enn at geva íðkarum eina eyka byrðu við at útrópa tey til talent/ikki-talent, so er betri at skapa eitt venjingarumhvørvi, sum hevur til endamáls at menna øll, har tey eru, fyri á tann hátt at geva øllum ein møguleika fyri at blóma innan ítróttina, eisini teimum, sum blóma seint eins og t.d. olympiski meistarin frá 2008 í diskuskasti, sum ikki byrjaði at venja diskuskast miðvíst fyrr enn hann var 17 ára gamal.

> ***» Tað er tó ikki ógjørligt, og um viljin og hugurin er har, so eru nógvar søgur um, at fólk hava megnað at vunnið heiðursmerkir á OL, hóast tey ikki eru fødd við einum kroppi, sum hóskar til ta ítrótt, tey blivu forelskað í sum børn***

# TÁ RÆTT SKAL VERA RÆTT

SENDISTOVAN





ADVOKATSKRIVSTOVAN

Halgir Winther Poulsen, adv.

Fríða Patursson, adv.

Óla Jákup Kristoffersen, adv.

Christian Andreasen, adv.

Niels Winther Poulsen, adv.

Jógvan E. Winther Poulsen, adv.

Eyðbjørn Larsen, adv.

Birita S. Samuelsen, adv.

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN

TELEFON: (298) 35 33 35 · TELEFAX: (298) 35 33 36 · WWW.JURA.FO


Bilasolan.fo
Nýggi Audi A3 Sportback
Langt á odda.
Audi
Vorsprung durch Technik
Bilasølan
Vegurin langi, 359700


Altíð okkurt
sunt og gott
www.fast.fo
fast:

# h71 klæðini 2015/16



h71 INTERSPORT Thomas Dam Ítróttur adidas


Vælkomin inn á gólvið hjá okkum ... her finnur tú altíð okkurt!
pf Skálabúðin
DR. JACOBSENSGØTA · TEL. 315 315


Matstovur keypa gass og køksútbúnað
frá
p/f Sveisingahandilin
Mykinesgøta 8 · FO-100 Tórshavn · Tel 311909


SKORA VIÐ SISU
SISU
Föroya Bjór

FAROE SHIP

# SPEKT kann hjálpa tær við

Bókhaldinum

Roknskapinum

Lønarumsitingini

Sjálvuppgávuni

Kapitalvinnings-sjálvuppgávuni

Rentustuðlinum

Útlendskum skatti

Afturrindan av mvg

Eftirlønum

SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. · Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn · Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

SPEKT | løggildir grannskoðarar

### Gullpakkin við keypi av nýggjum bili

# Við Gullpakkanum vinnur tú hvørja ferð

**Tá tú keypir nýggjan bil frá Auto Service, fylgir Gullpakkin við, sum ger at tú sleppur undan at hugsa um útreiðslur til viðlíkahald og eftirlit av bilinum næstu trý árini.**





*Heðin Weihe, verkstaðsleiðari*

Visti tú av, at tú eigur, sambært framleiðaranum av bilinum, í minsta lagi einaferð um árið til eftirlit við bilinum fyri at varveita garantiið ?

Somuleiðis mást tú skifta olju í mun til, hvussu nógv tú koyrir, perur fara, sprinklaraveska skal fyllast á so hvørt, og so alt annað, so sum bremsur, útstoyt og stoytdoy-varar kunnu fara.

Alt hetta kann gerast til heilt fitt av peningi. Men við Gullpakkanum, sum fylgir við, fært tú alt hetta fyri einki..! Ja, í veruleikanum fært tú ein mekanikara við eykalutum í 3 ár ella til tú hevur koyrt 90.000 km, við í prísinum, tá tú keypir nýggjan bil frá okkum.

Vælkomin til eitt gott bilakeyp.



**Í Gullpakkanum fært tú:**

- Eftirliti og viðlíkahald av bilinum og haraftur at allar neyðugar umvælingar
- Arbeiðsløn, eykalutir sum t.d. perur, viskarabløð og neyðugar veskur og viðlíkahalds- og umvælingararbeiði.
- Tað vil siga: **Ongar viðlíkahalds-útreiðslur komandi trý árini!**

Sí treytir á www.autoservice.fo

Auto Service
www.autoservice.fo

Undir Krákugjógv 19 - Postboks 3168 - 100 Tórshavn - Tel 34 54 00 - as@autoserice.fo

BYGMA
BALSLEV

Stuðlar ítróttini

SAMSKIP
Saman røkka vit málinum

yviri við Strond 23 – Postbox 3255 – Tel. 30 88 00 – Fax. 30 88 01 – www.samskip.com




SENDISTOVAN

amr.fo

# TEY SVØRTU TØLINI

## DYSTARYVIRLIT HJÁ H71 Í FTZ DEILDINI

| Dato | Heimalið | Útilið | Úrslit |
|---|---|---|---|
| 23.09.2015 | H71 | Neistin | 27-16 |
| 26.09.2015 | H71 | StÍF | 25-22 |
| 04.10.2015 | VÍF | H71 | 25-30 |
| 11.10.2015 | H71 | T. Klaksvík | 31-23 |
| 15.10.2015 | Kyndil | H71 | 22-25 |
| 01.11.2015 | KÍF | H71 | 20-25 |
| 11.11.2015 | StÍF | H71 | 21-27 |
| 15.11.2015 | H71 | VÍF | 28-24 |
| 18.11.2015 | Neistin | H71 | 16-26 |
| 21.11.2015 | T. Klaksvík | H71 | 24-37 |
| 29.11.2015 | H71 | Kyndil | 29-24 |
| 13.12.2015 | H71 | KÍF | |
| 16.12.2015 | H71 | StÍF | |
| 19.12.2015 | Neistin | H71 | |
| 06.01.2016 | VÍF | H71 | |
| 09.01.2016 | H71 | T. Klaksvík | |
| 17.02.2016 | H71 | Kyndil | |
| 28.02.2016 | KÍF | H71 | |
| 06.03.2016 | H71 | Neistin | |
| 13.03.2016 | StÍF | H71 | |
| 19.03.2016 | H71 | VÍF | |
| 23.03.2016 | T. Klaksvík | H71 | |
| 03.04.2016 | Kyndil | H71 | |
| 16.04.2016 | H71 | KÍF | |

## STØÐAN FTZ DEILDIN

| Nr. | Lið | Dystir | V.m | T.m. | Munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | H71 | 11 | 310 | 237 | 73 | 22 |
| 2 | KÍF | 11 | 283 | 245 | 38 | 15 |
| 3 | VÍF | 11 | 298 | 294 | 4 | 13 |
| 4 | Kyndil | 12 | 321 | 306 | 15 | 11 |
| 5 | StÍF | 11 | 286 | 285 | 1 | 9 |
| 6 | Neistin | 11 | 259 | 274 | -15 | 8 |
| 7 | T. Klaksvík | 11 | 248 | 364 | -116 | 0 |

*Dagført: 9.12.15*

# LIÐINI HESUFERÐ

## H71

**Málmenn:**

1 Ári E. Dam
12 Tóraldur Kollsker
16 Johan Hofgaard

**Útileikarar:**

2 Rasmus Rasmussen
3 Mark Lausen Marcher
4 Boas Heinesen
6 Djóni Vest Højgaard
7 Eindri Frýdal
8 Pætur Thomsen
11 Hans Kári Hansen
13 Oddur Bech
14 Sigmundur Dahl
15 Sigmundur Nolsø
18 Andor Sivertsen
22 Helgi Hoydal
45 Peter Krogh
89 Jónas Djurhuus
99 Tróndur Arge

*Venjarar:*
**Petur Mittún**
**Halgir Dahl Olesen**

*Málmansvenjari:*
**Jens à Skipagøtu**

*Liðleiðarar:*
**Petur Sivertsen**
**Rene Dahl Olesen**
**Andras Marr Poulsen**

## KÍF

**Málmenn:**

1 Emil Dam
12 Pætur H. Skýrindal

**Útileikarar:**

2 Andrias Nielsen
9 Fríði Weyhe
13 Tony Weyhe
14 Poul F. Egholm
17 Teitur Joensen
24 Vilhelm Magnussen
27 Hans Eli Sigurbjørnsson
29 Rógvi Weyhe
34 Rúni Joensen
37 Jákup Trygvason

*Bonkur:*
**Jeppe Borch**
**Eddie H. Joensen**
**Magnus D. Jocobsen**
**Ási Dam**

»GOTT ER AT HAVA GÓÐAN Í RÁÐUM«



ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4

YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 203040 · FAX 203041 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
LAWFIRM@LAWFIRM.FO
WWW.LAWFIRM.FO

JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD
GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR
JULIANNA KLETT